

*Tey, sum koyra við Fiat Multipla, verða skjótt greið um, at tað er sera lætt at koma í samband við fólk, tí øll hava okkurt at siga um útsjóndina á bilinum. Heldur ikki er vandi fyri, at tað ikki verður lagt merki til tín…*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Fiat Multipla — ein øðrvísi bilur

Magnus Gunnarsson

Tá Fiat Multipla fyrstu ferð varð vístur fram á altjóða bilaframsýningini í Torino í 1996, vóru tey flestu á ein um máli um, at Fiat ikki tordi at framleiða hendan bilin, sum var so øðrvísi og líktist einum springara framman. Men tað gjørdu teir, og nú hava vit bilin her. Multipla, ið er ein MPV bilur, livir væl og virðiliga upp til sítt navn sum ein multibilur.

### Flest øll koma við eini viðmerking

Tey, sum koyra við Fiat Multipla, verða skjótt greið um, at tað er sera lætt at koma í samband við fólk, tí øll hava okkurt at siga um útsjóndina á bilinum. Heldur ikki er vandi fyri, at tað ikki verður lagt merki til tín. Hetta er væl skiljandi, tí Multipla hevur eitt so øðrvísi design, at flest øll mugu koma við eini viðmerking.

Mátin, sum Multipla er gjørdur uppá, er genialur. Meðan flestu 6 persónabilar hava setrini býtt í trý røð, kann Multipla hava seks persónar á tveimum røðum, har tey hava hvør sítt setur við góðum plássi. Stólarnir kunnu leggjast niður og brúkast sum borð, eins og baksetrini kunnu takast út. Lætt er at koma inn og út gjøgnum tær breiðu hurðarnar. Dúrkið er púra slætt, og nógv smá rúm eru til at leggja ting frá sær í. At innaru hurðahandtøkini eru so stór, er ein góð hjálp í vindi, tá tað kann vera skjótt at missa hurðina.

### Stuttur, breiður og høgur

Tá ein bilur er høgur, hevur breiddin stóran týdning fyri koyrieginleikarnar, tí breiðari bilurin er, lægri verður tyngdarpunktið, og betri klárar bilurin seg í svingum. Multipla er 399 cm langur, 187 cm breiður og 167 cm høgur. Undarlig mát fyri ein familjubil, men Multipla er sera stúttur í svingum og koyrieginleikarnir er heilt í topp.

Hjá bilføraranum er alt væl innrættað, man skal tó venja seg við, at øll instrumentini eru í miðjuni á instrumentborðinum, men allar kontaktir og tað, tú hevur brúk fyri undir koyring, er har tað skal vera. Rættið kann stillast í hædd, og førarasetrið kann stillast 4 cm uppeftir. Forlyktirnar eru í trimum hæddum. Langljósini eru ovast, líka undir forrútinum, nærljósini eru í vanligari hædd, og toklyktirnar í kúfangaranum.

Standardútgerðin er eisini umfatandi við t.d. ABS bremsum, airbag framman og í síðunum, elektroniskari startsperru, servostýring, sentrallás, el-rútum framman, el-síðuspegl við varma.

Multipla, sum fæst við bensin og dieselmotorum, er ein praktiskur, spennandi og øðrvísi bilur.






## Fiat Multipla

1.6 100 SX

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl bensin 16V 103 HK |
| 0-100 km/t | 12,6 sek. |
| Trekk | Framman/5 gear |
| Bremsur | Skivur framman og trumlur aftan |
| Dekkstødd | 185/65-15 |

Stødd og vekt

| | |
|---|---|
| Longd | 399 cm |
| Breidd | 187 cm |
| Hædd | 167 cm |
| Eginvekt | 1275 kg |
| Viðførisrúm | 430 litrar |
| Prísur | kr. 169.600 |

Aðrar útgávur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1.6 l | 100 ELX | 16V | bensin. | kr. 184.600 |
| 1.9 l | 105 SX | JTD | diesel | kr. 194.600 |
| 1.9 l | 105 ELX | JTD | diesel | kr. 208.600 |

**Søluumboð**
**Bilfríðkan**
**Smiðjugerði**
**FO-110 Tórshavn**






*Inni í garasjuni hjá Sofusi. VW Boblan við Mercedes fronti, sum kom á annað plássi á eini altjóða bilaframsýning í Svøríki, har einir 3000 bilar úr øllum heiminum luttóku. Bilurin høgrumegin er ein Chevrolet Corvette, sum Sofus hevur bygt so nógv út, at hann er ikki til at kenna aftur*

# Framsýningarbilar hjá Sofusi

Bilarnir hjá Sofusi Hansen hava altíð verið nakað serligt.

Teir hava fingið nógva umtalu her heima, og teir hava vunnið fleiri virðislønir uttanlands, serliga í Svøríki, har Sofus Hansen eisini hevur arbeitt.

Sofus Hansen lærdi til bilsmið hjá Hans Johannes Clementsen, og hevur hann mst fingist við at umbyggja og lakkera bilar.



*Sofus er nú í ferð við at seta henda VW Transportaran við last í upprunastand. Ein sera hugnaligur gamal bilur frá 1964 - sum bert koyrdi 8.000 km til hann rendi í veggin í tunnlinum norður í Sund á Borðoynni. Sofus keypti bilin úr Norðdepli*



*Herfyri kom Sofus framvið eini framsýning í Odense í hesum Corvette'inum. Hann varð biðin um at steðga á til virðislønirnar skuldu latast - og fekk hann heilt óvæntað aðru virðisløn fyri útbygging og lakkering…*




Hesin Citroën CX hjá Sofusi hevur vunnið triðju virðisløn í »Costom Cars-framsýning« í Svøríki



*Sofus við Corvette'num. Hesin fer óiva eisini at vinna virðislønir uttanlands í framtíðini. Wheels-framsýningarnar í Svøríki spyrja javnan eftir honum…*